# Vit fáa alt fleiri heil

**Ov tíðliga fødd børn, inngiftan og evnafrøðilig evni eru nakrar av orsøkunum til, at alt fleiri donsk børn eru seinment og heilaskadd, sigur danskur professari og barnaneurologur. – Nógv bendir á, at hetta eisini er galdandi í Føroyum, sigur Pál Weihe, yvirlækni og granskari**



BØRN OG UNG
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Síðstu tíðina hevur nógv verið prátað um børn við menningarórógvi, ADHD og autismu. Hetta fær kanska fólk at spyrja seg sjálvi um hetta eru nýggjar diagnosur ella um talan bara er um sjúkueyðkenni, sum altíð hava verið til, men sum ikki hava havt nakað navn.

Danski professarin og barnaneurologurin á Ríkissjúkrahúsinum Peter Uldall er komin til ta niðurstøðu, at í Danmark verða alt fleiri børn fødd við heilaskaða, sum hava ilt við at læra og tí fáa serundirvísing. Sambært danska professaranum eru ov tíðliga fødd børn, inngiftan og evnafrøðilig evni nakrar av orsøkunum til, at fleiri børn verða fødd við heilaskaða - fyribrigdi, ið vit sum kunnugt hava í felag við danir – burtursæð frá, at meðan inngiftanin í Danmark fer fram millum innflytarar úr Miðeystri og Asia, halda vit føroyingar inngiftanini innangarðs, kundi ein sagt.

Í Føroyum vita vit serliga nógv um ávirkanina frá evnafrøðiligum evnum. Sambært Pál Weihe, yvirlækna á Deildini fyri Arbeiðs- og Almennaheilsu, hava vit ikki beinleiðis granskað í talinum av heilaskaddum ella børnum, sum hava tørv á stuðli.

- Møguliga eru fleiri børn, sum hava tørv á stuðli. Men krøvini til børnini í dag eru eisini øðrvísi enn fyrr. Tí eru parametrini ósamanberilig, sigur Pál Weihe.

Men kortini man lítil ivi vera um, at sama rák er galdandi í Føroyum, at alt fleiri børn eru so seinment, at tey hvørki standa seg fakliga ella sosialt.

Pál Weihe vísir á, at allar kanningar vísa, at evnafrøðilig evni hava negativa ávirkan á menningina hjá fostrum.

- Ongin ivi er um, at vit hava eina rúgvu av kemiskum evnum í umhvørvinum, og at hesi hava negativa ávirkan á børn okkara, sigur Pál Weihe, sum eisini vísir á, at hetta er eitt øki, sum vit vita nógv um her á landi.

## 48 prosent yvir 10 ár

Í blaðgrein í Berlingske Tidende um dagarnar verður greitt frá um økta talið av heilaskaddum børnum í Danmark. Líka úr 1. flokki í Keypmannahavn til 10. flokk í Aalborg hava fleiri og fleiri skúlanæmingar somikið stórar fakligar og sosialar trupulleikar, at teimum tørvar umfatandi serundirvísing. Sambært nýggjari kanning frá danska undirvísingarmálaráðnum er talið hækkað við 48 prosentum síðstu 10 árini. Sostatt er samlaða talið í dag omanfyri 11.000 næmingar í Danmark.

Ein sannroynd er tað, at talið á børnum, sum fáa umfatandi serundirvísing í føroyska fólkaskúlanum er ikki umboðandi fyri veruliga tørvin á serundirvísing. Og sambært Pál Weihe ber heldur ikki til at samanbera tølini í dag við tølini fyrr.

- Krøvini til bókligar førleikar eru herd nógv seinastu árini. Tí ber ikki til at siga, at børnini í dag eru meira seinment út frá hesum, sigur Pál Weihe, sum tó viðgongur, at tað er eitt nógv størri brek í dag, ikki at standa seg fakliga og sosialt.

- Fyrr fóru hesi børnini bara tíðliga úr skúlanum og fingu kortini eitt pláss í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum. Í so máta er ongin ivi um, at børn sum ikki standa seg fakliga og sosialt í dag, eru tarnað, sigur hann.

Men hví hava alt fleiri børn ilt við at lesa, rokna, skilja og at vera saman við øðrum børnum? Duga foreldur og lærarar betur at finna og eyðmerkja hesi "truplu" børnini? Hava skúlar og myndugleikar fleiri og betri tilboð? Hava fleiri børn diagnosur sum ADHD? Ella eru tað veruliga fleiri tornæm børn við innlæringartrupulleikum?

Í sambandi við heilavikuna, sum er júst í hesum døgum, hevur Peter Uldall, hildið fyrilestrar kring um í Danmark, har hann hevur givið sítt boð uppá spurningarnar.

## Heilaskaðar

Professarin ásannar, at ein orsøk til vaksandi talið av næmingum, sum hava umfatandi serundirvísing fyri neyðini, eru sosial og mentanarlig atlit. Eitt nú negativur sosialur arvur og tvímálsligheit, men, at tað trúliga eisini er ein veruligur vøkstur í talinum av børnum, sum hava ilt við at læra. Altso børn, sum dragast við stórar ella smáar heilaskaðar, vánaligar arvaeginleikar ella hava aðrar trupulleikar, sum gera, at tey fáa onki burturúr vanligari undirvísing, og verða ikki før fyri at røkja eitt vanligt starv seinni í lívinum.

- Eftir øllum at døma, eru fleiri seinment børn, so ella so, sigur professarin, og vísir í hesum sambandi á, at eitt nú talið á ov tíðliga føddum børnum er hækkað úr fimm upp í sjey prosent síðstu tíggju árini. Serliga børn, sum vigaðu undir 1500 g, hava ilt við at læra.

- Tá vit fylgja hesum børnum, til tey eru umleið